# Býr ein verkførari í tær?

**P/F Ivan Johansen Bilar søkir eftir búnum lærlingi M/K til verkføraraskrivstovuna.**

**Sum lærlingur** á verkføraraskrivstovuni ert tú ein týðandi partur av virksemi felagsins, av tí at tú í felag við verkføraran hevur ábyrgdina av samskiftinum við viðskiftafólk okkara eftir bilakeypið.

**Uppgávurnar fevna m.a. um:**

- Móttøka
- Innskriving
- Fakturering
- Annað fyrifallandi arbeiði

Tekniskur kunnleiki til bilar er ikki neyðugur, men tó ein fyrimunur.
**Neyðugt er**, at tú ert virkisfús/ur, álítandi og leggur dent á kundatænastu.
**Løn eftir avtalu**.

**Send** eina umsókn ella teldupost **innan 1. februar 2007** til:
P/F Ivan Johansen Bilar • Postbox 3205 • Hoyvíksvegur 63 • FO-110 Tórshavn • ivan@ivan.fo

*P/F Ivan Johansen Bilar er einasta ISO góðkenda bilasøla í Føroyum. Felagið bleiv stovnað í 1971 og hevur støðugt ment seg til at verða ein av størstu bilasølum í landinum. 23 fólk starvast hjá P/F Ivan Johansen Bilum, og felagið umboðar Mercedes-Benz, Citroën, Mitsubishi, Chrysler, Jeep og Dodge.*

DNV

CHRYSLER Jeep CITROËN Mercedes-Benz

**Ivan Johansen Bilar**

Hoyvíksvegur 63 · Postboks 3205 · 110 Tórshavn · tel 31 36 66 · ivan@ivan.fo · www.ivan.fo

DIMMALÆTTING 341200

# LINEDANCE

NÚ FARA VIT AFTUR AT DANSA LINEDANCE Í GLÆMUNI Í KVÍVÍK.

SKEIÐIÐ BYRJAR HÓSDAGIN 25. JANUAR OG DANSAÐ VERÐUR HVØRT HÓSKVØLD FRÁ KL. 20-21.30 Í 10 VIKUR.

KOSTNAÐUR FYRI SKEIÐIÐ ER 425,- KR.

PLÁSS ER FYRI 25 LUTTAKARUM.



TILMELDING Á TLF. 221262 ELLA 227701

**DEMMUS HENTZE**
landsrættarsakførari

**TURIÐ DEBES HENTZE**
advokatur og mediator m.m.c.r.

Tórsgøta 17 - Postboks 236 - FR 110 Tórshavn
Tlf. 311460 • Telefaks 311490 • E-mail:hentze@hentze.fo
www.hentze.fo

## Gerast mediator

**Intensivt skeið í mediatión – konfliktmekling**

Mediatión er skipaður dialogur, sum gevur ósamdum pørtum møguleika til undir leiðslu av meklara/mediator at tosa seg til sættis. Samtala kann vera trupul, tá ósemjur eru og nógvar kenslur. Misálit og mistulkingar og óheppið tosingarlag skaðar samskiftið, og trætan kann fastlæsast so, at ilt kann vera at koma sær burturúr aftur uttan hjálp uttanífrá.

Mediator hevur útbúgving sum tann uttanveltaði triðjipersónur, sum skipar samtaluna so, at partarnir lættari gerast førir fyri sjálvir at loysa ósemjuna og at hyggja frameftir. Meklarin eigur ikki lut í konfliktini, høvdið er kalt og høvið at stýra samskiftinum er tí serstakt.

Meklarin hvørki vegleiðir, gevur ráð, sigur sína hugsan ella tekur avgerðir í málinum, men ansar eftir, at partarnir samskifta so, at allir møguleikar verða troyttir til tess at finna fram til eina semjuloysn. Trætumekling er ein samráðingarháttur at loysa ósemjur og trætur, sum hevur sum fortreyt, at partarnir ynska eina semjuloysn.

**15. mars og 5. apríl 2007:** kl. 18.00 – 21.00
Teorisk kunning um konfliktmynstur og mediatión. Til henda teoretiska partin skal lesast tilfar. Eisini verður rolluspæl í tilknýti til teoriina og videosýning av mediatión á arbeiðsplássi.

**9. maj til og við 11. maj:** kl. 9.00 – 16.00
Intensiv mediatorvenjing við rolluspølum í 3 heilar dagar við tveimum undirvísarum.

**7. juni og 21. juni:** kl. 18.00 – 21.00
Uppfylging av teori og praksis og viðgerð av teimum etisku reglunum.

**Avmarkað luttøka:**
Til tess at luttakararnir skulu fáa høvi veruliga at royna seg sum meklarar, er luttøkan avmarkað til 14 persónar.

**Kostnaðurin:**
Íalt kr. 10.500 pr. persón. Matur á middegi og kaffi er íroknað teir 3 dagarnar, rolluspølini eru. Aftrat kemur kostnaður fyri keyp av bók, uml. kr. 300,- . Annað tilfar er íroknað skeiðsgjaldinum.

**Tilmelding og fyrispurningar:**
hjá Turið Debes Hentze, tlf. 311460 ella tdh@hentze.fo

**Málbólkur:**
Einhvør, sum hevur tørv á betri kunnleika at handfara konfliktstøður, og sum hevur ábyrgdina av at handfara tvístøður millum fólk á skilagóðan hátt. Umframt at fáa førleikan at virka beinleiðis sum mediator, fæst grundleggjandi innlit í, hvussu ein við egnum atburði og málburði ávirkar eina ósemju. Undirvísingin mennir eisini eins egnu evnir at samráðast konstruktivt.

**Dømi um málbólkar:**
Fólk í leiðslustørvum, (konflikthandfaring og samráðing). Starvsfólkaviðurskifti. Skúlaverkið (skúlamekling, happing, samstarv við foreldur o.a.) . Konfliktstøður innan ítróttina. Advokatar og dómarar. Løgreglan (samskifti við og millum gerningspersón og offur). Fakfelagsumboð, álitisfólk. Barnaverndn (samskifti við foreldur, børn, avvarðandi, fosturforeldur). Kommunur og land - samskifti við borgaran. Politikkarar.

Teoretiska undirvísingin fevnir um:
Konflikt fatan. Ymiskar konfliktloysnir. Egnan leiklut í konflikt. Konfliktmynstur. Konfliktupptrapping og –avspenning. Evnini at lurta og tosingarlag. Dialog og samráðing. Hvørjar fellur eru - hvat er ikki dialogur. Mediatión, sum ein háttur at finna semjur. Hví mediatión virkar og hvørjar treytirnar eru fyri mediatión. Hvørji sereyðkennini eru við mediatión. Nágreinilig gjøgnumgongd av mediatiónsstigunum. Leikluturin hjá pørtunum og meklara. Ymiskir mediatiónshættir og endamálið við hesum. Førleikakrøv til meklaran. Etiskar reglur.

**Undirvísarar:**
Turið Debes Hentze, mediator
Lin Adrian, mediator og undirvísingarleiðari á Kbh. Universitet
Lotte Christie, mediator

**Meiri kann lesast um mediatión, konfliktmekling á heimasíðuni www.hentze.fo**